# Armar orna andlit rodna

**Seinnapartin í næstu viku fara hundraðtals fólk at hittast til dans og gleim í ymsastaðni í Føroyum. Stóra dansistevnan Havleikur verður í Havn, og eisini fara útlendsku gestirnir, sum koma til stevnuna, at vitja dansifeløgini kring landið**

DANSUR
*Edvard Joensen*



*Stór fleirtjóða dansistevna fer at seta dám á Havnina og partar av landinum í komandi viku. Umleið 300 útlendskir dansarar koma á vitjan, og føroyingar fara eini at vísa síni kynstur á gólvi*

Stóra fólkadansarastevnan Havleikur verður sett í Havn mikukvøldið og heldur á vikuna út. Endað verður við stórari veitslu og dansi leygarkvøldið.

Einir 300 útlendskir gestir koma til dansistevnuna, og umleið sama tal ella so av føroyingum fara eisini at luttaka hesar dagarnar.

Fremmandu gestirnir koma úr øllum Norðanlondum. Tó eru samar og grønlendingar ikki við, men hinvegin koma dansarar úr Hetlandi í staðin.

Dansistevnan Havleikur er avleiðing av stóru norðurlendsku dansistevnuni, Nordleik, sum føroyingar mangar ferðir hava luttikið á. Í ár var so túrurin komin til føroyingar at skipa fyri, og valdi landsfelagið Sláið Ring at halda stevnu í Føroyum undir heitinum Havleikur.

Havleikur verður settur á Vaglinum í Havn mikukvøldið klokkan 19.00. Umborð fyri Sláið Ring fer at bjóða vælkomin á stevnu, og borgarstjórin í Havn fer at bjóða vælkomin til Havnar. Landsstýrismaðurin við mentamálum, Annlis Bjarkhamar, fer síðan at seta stevnuna, og so verður dansað.

Hvørt landið sær fer at sýna onkran av sínum dansum, og endað verður við føroyskum dansi, har øll, bæði stevnuluttakarar og áskoðarar annars, taka saman og kvøða Ormin Langa, sum skilst.

Síðan verður gingið niðan í Sjónleikarhúsið og í eina fimleikarhøll í Kommunuskúlanum, har sonevndur samansjóðingardansur verður til midnátt.

Viðrar ikki at hava setanina úti, verður hon í staðin í ítróttarhøllini á Hálsi.

Hósmorgunin spjaðist múgvan kring landið, har ymsu dansifeløgini eru vertir teirra fremmandu, sum skulu sleppa at síggja lankað av landinum og sýna fólki sínar dansir ymsastaðni, har tey koma. Hesar útferðirnar vara allan dagin.

Afturkomin til Havnar um kvøldið verður aftur strongt til leik og spæl, og dansað verður til út á náttina.

Fríggjadagin fara tey nógvu aftur útferðir. Hesaferð til Fugloyar, har eisini verður ligið nátt.

Tó verða summi eftir í Havn, har skipað verður fyri fyrilestrum um ymiskt, sum hevur við dansimentan at gera soleiðis beinleiðis ella óbeinleiðis.

Tosað fer at verða um føroyskar dansivanar, um at vaksa upp við føroyskum dansi, um føroyska bátin, eins og sagt fer at verða frá føroyska búnanum, sum fleiri av luttakarunum fara at bera hesar dagarnar, stevnan er.

Aftur fríggjakvøldið verður sum vera man dansað.

Leygardagin verður dansað kring Havnina og í Kirkjubø. Tá fara stevnuluttakararnir, bæði gestir og vertir, at vísa sýni kynstur á 12 ymsum støðum kring í høvuðsstaðnum og í Kirkjubø.

Um kvøldið verður stór fráfaringarvetsla í Ítróttarhøllini á Hálsi, har umleið 650 fólk fólk verða við. Matskráin verður úr havinum. Havleikur er.

Eftir borðhaldið verður dansað bæði í ítróttarhøllini og í HB húsinum.

Sunnudagn fara flestu gestirnir avstað aftur, men onkur verður verandi til mánadagin, tá tey allarseinastu fara.

# Clickhaze fekk vánaligt ummæli



*Áðrenn konsertferðina til Danmarkar, spældi Clickhaze nakrar konsertir í Føroyum. Her er tað Eivør, sum spennir seg út á konsertini í Vestamma herfyri*

**Tvær stjørnur og nakrar hvassar viðmerkingar. Tað var hvat ummælarin á danska tónleikablaðnum Gaffa helt framførsluna hjá Clickhaze á Roskildefestivalinum vera verda.**

TÓNLEIKUR
*Rúnar Reistrup*

Tað man vera fáum ókent, at Clickhaze mikudagin sum fyrsti føroyski bólkur nakrantíð spældi eina konsert á danska Roskildefestivalinum. Á vevsíðuni hjá Clickhaze stendur at lesa, at konsertin var feit, sum tað verður nevnt, og at Clickhaze ongantíð fyrr hevur spælt fyri so stórari mannfjøld.

Men konsertin hóvaði eftir øllum at døma ikki øllum eins væl. Danska tónleikablaðið Gaffa gevur undir Roskildefestivalinum út eina sokallaða festivalvís, nevnd Roskilde Daily, har millum annað ummæli av dagsins konsertum verða prentað.

Ein av ummælarum blaðsins, Rune Geertsen, hoyrdi konsertina hjá Clickhaze mikudagin. Hann helt ikki nógv um framførsluna hjá føroyska bólkinum.

### Studentaskúlabólkur

Ummælarin byrjar sítt ummæli við orðunum "Denne anmeldelse pisser sikkert en hel del færinger af. Beklager. Men de lokale helte har bare ikke formatet til det, de kaster sig ud i."

Vi einum lítlum orsaka til teir føroyingar, sum kenna seg stoyttar av vánaliga ummælinum, fer ummælarin víðari við kritikkinum. Hann sigur royndinar hjá Clickhaze at spæla originalan tónleik miseydnast, og kallar ístaðin tónleikin uppgjørdan og keðiligan.

Ummælarin endar við at kalla Clickhaze fyri eina samanrenning av Hedningarna og Skunk Anansie spæld av einum studentaskúlabólki, og gevur framførsluni tvær stjørnur.

Hetta eru ikki júst rósandi orð Clickhaze fær á vegnum frá festivalavísini, men samanlagt man bunkin av rósandi ummælum um Clickhaze fylla væl meira enn tey minni positivu.

Og tíbetur fyri Clickhaze eru tað vanliga ikki ummælararnir, men áhoyrararnir, sum avgera, hvussu langt ein bólkur kann koma við sínum tónleiki.





*Ruth á veg á Fuglafjørð hósdagin eftir lodnunótini.*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

# Ruth til Grønlands á lodnuveiði

**11 føroyingar sigla við Ruth, sum er gamli Havlot. Gulak Madsen eigur skipið, sum er heimahoyrandi í Hirtshals**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*

Nótabáturin, Ruth, sum føroyingurin, Gulak Madsen í Hirtshals eigur, hevur verið í Føroyum nakrar dagar. Hósdagin vóru teir á Fuglafirði eftir lodnunótini, nú teir skulu til Grønlands, og tá nýtti Sosialurin høvi at hyggja fram við.

Ætlanin var ikki at steðga leingi í Fuglafirði, áðrenn kósin varð sett vestureftir.

Í stívliga hálvan annan mánaða hevur Ruth roynt eftir norðhavssild í altjóða sjógvi uppi við Svalbard og Jan Mayen. Teir hava landað sildina í Noregi og eisini umborð á norsk frystiskip, sum liggja har uppi.

Tað er ein treyt fyri kvotunum hjá nótabátunum, sum eru heimahoyrandi í Danmark, at ein partur av veiðini verður landaður til matna.

Í Føroyum hevur Ruth lagt sildanótina upp, og nú teir vóru á Fuglafirði, vóru teir eftir lodnunótini.

### 11 mans við Ruth

Á kokkakamarinum umborð á hittu vit kokkin, Jón Nystrøm, sum seinastu árini hevur búð í Danmark og hevur siglt við Ruth í nøkur ár. Hann var blíður og fryntligur og vildi fegin tosa við blaðið um leyst og fast. Jón flutti til Danmarkar í kreppuárunum og hevur búð niðri síðan.

Men eins og allir hinir av manningini, noyddist Jón at hjálpa til at fáa stóru lodnunótina umborð. Vit avtalaðu at ringja til hansara, tá ið høvi beyðst. Nær eitt slíkt høvi verður, er ilt at siga, nú leiðin ber til Grønlands. Væntandi verður Ruth í Grønlandi til ólavsøku, men tað veldst um fiskiskap og kvotu.

Á brúnni hittu vit skiparan og beiggja eigaran, Asbjørn Madsen, sum báðir eru synir Arngrím Madsen, sála, í Kvívík.

Hann sigur, at Ruth, sum bróðurin nú eigur einsamallur, er triðja skipið, sum teir hava havt við at gera. Frammanundan vóru teir parteigarar í Lenu Polaris og seinni eisini Mariu Polaris.

Ruth er gamli Havlot, og Gulak keypti skipið í 1990.

- Áðrenn skipið fór til fiskiskap, fekk Ruth nýggja brúgv og nýggja hekku í Noregi, sigur Asbjørn.

11 mans eru við Ruth, allir eru føroyingar, men onkur býr í Danmark.

### Stýrdir av kvotum

Skiparin letur hampiliga væl at gongdini, men sigur, at teir eru nógv stýrdir av kvotum.

- Vit fiska sild, makrel og lodnu.

Hann sigur, at nú teir fara í grønlendskan sjógv at royna, verður lodnan helst

løgd upp á Bolungavik í Íslandi, sum liggur í útnyrðingarpartinum av Íslandi og er stytsta farleið úr Grønlandi.

- Vit plaga at verða heima aftur á ólavsøku, men okkurt árið hevur verið

roynt út í august mánaða. Royndin er nógv har yviri hesa tíðina, og tá ið líður út á summarið, plaga skipini at missa lodnuna burtur. Úr Danmark fara bæði nótaskip og trolarar til Grønlands at royna eftir lodnu, sigur Asbjørn Madsen.

Tá ið Ruth kemur aftur úr Grønlandi, fer skipið á makrelveiði.



*Asbjørn Madsen, skipari og beiggi eigaran, Gulak Madsen, letur hampiliga væl at gongdini. - Men vit eru nógv stýrdir av kvotum, sigur hann*



*Kokkurin, Jón Nystrøm, hevði eisini úr at gera, tá ið lodnunótin skuldi hálast umborð*